VIÐMERKINGAR

# Bjarnartænastan í Leirvík

SÓLRUN FOLDBO
Leirvík.

Hugsi mær, at nógvir føroyingar eru móðir av at hoyra um vegaføringina í Leirvík. Tíverri eru tað vit leirvíkingar, sum verða uppfataðir av Føroya fólki at vera grenjutir. Men eg haldi, at hetta er at gera okkum órætt. Tí enn hava vit einki fingið av tí, sum varð lovað okkum.

Leirvíkingar fingu at vita, at um vit fingu veg ígjøgnum bygdina, skuldi hann verða liðugur, tá Norðoyatunnilin lat upp. Um vit heldur ynsktu ein tunnil undir bygdina, fingu vit at vita, at hesin ikki fór at verða liðugur, tá Norðoyatunnilin lat upp, og at ferðslan mátti koyra ígjøgnum bygdina í eitt avmarkað tíðarskeið. Leirvíkar kommuna samtykti so at loyva ferðsluni ígjøgnum bygdina í upp til 2 ár, treytað av at vit fingu eina góða loysn. 26. mars í 2002 bleiv tunnil samtyktur í løgtinginum. Nú hava vit so bíðað í samfull 4 ár eftir einum tunli, men hava ongan fingið enn. Politikarar hava bara broytt lógina soleiðis, at vit skulu fáa ein veg álíkavæl.

Í desember 2005 bleiv lógin broytt til at umfata tunnil ella veg og fyri trimum mánaðum síðani, bleiv lógin broytt enn einaferð til bert at umfata veg. Undri meg yvir, at tað er so lætt at broyta eina lóg og snúgva sær undan sínum lyftum í hesum landi. Tað er mær ein gáta, at løgtingið fyrst spyr leirvíkingar, hvat vit ynskja, fyri síðani at ganga ímóti ynskinum, sum annars varð samtykt við lóg. Eisini má eg blíva við at spyrja meg sjálva, hví tað er av so stórum týdningi fyri øll onnur at siga hvat er besta loysn í Leirvík.

### Lokarenna

Tá eg hoyrdi um lokarennuna, hugsaði eg, at nú var sloppið, tí hetta tyktist at vera ein góð og trygg loysn fyri allar partar. Áðrenn hetta hugskotið varð lagt á borðið, varð tað eingin loysn, sum veruliga varð góð. Lokarenna var harafturímóti ein loysn, sum flest allir Leirvíkingar kundu taka undir við, og sum bygdarráðið einmælt samtykti. Við eini lokarennu fer ferðslan undir hjartað í bygdini. Tað mesta av tí gamla sum er, verður varðveitt. Okkum nýtist ikki at hava ampa fyri børnunum, sum skulu í barnagarð og skúla. Virkini kunnu frítt byggja út. Eitt torg kann gerast, har talan hevur verið um tað. Handilin verður úttan ávirkan o.s.fr. Afturat hesum er lokarennan teknað soleiðis, at farleiðin gongur í eina beina linju. Á henda hátt verður farleiðin so stutt sum gjørlig, hon verður ikki tarnað av fólki, og tað er eisini ein fyrimunur um veturin í kava og hálku. Hetta er sostatt ein góð og trygg íløga í framtíðina.

### Vegur ovarlaga í bygdini

Hví skulu vit leirvíkingar siga ja takk til ein veg, sum tekur 130 grundøkir av okkara byggilendi? Longu nú eru tað fleiri, sum hava aftrað seg við at byggja, tí hendan óvissan hevur verið, og tí tey ikki ynskja at búgva við síðuna av einum landsvegi. Landsverk tosar um at leggja ein veg omanfyri bygdina, men tað er bert talan um fá ár, so liggur vegurin mitt ígjøgnum bygdina.

Tosað verður altíð um, at vegurin skal leggjast oman fyri bygdina. Í mínari verð, er hetta skeivt málborið. Bygdarhúsið liggur jú ovarliga í bygdini, og vegurin skal leggjast framvið bygdarhúsinum, møguliga niðanfyri bygdarhúsið. Við hesi loysn eru longu nú tvey sethús oman fyri vegin, umframt bygdarhúsið og LÍF-húsið og harvið fótbóltsvøllurin. Vit kunnu bara ímynda okkum ferðsluna, sum skal tvørturum hendan vegin, um tað so verður á vegnum ella undir vegnum. Talan er sostatt ikki um at leggja vegin omanfyri, men ovarlaga í bygdini. Hví verður tað hugsað so lítið fram í tíðina? Er tað ikki betur at nýta nakrar milliónir meira nú og gera eina góða íløgu í framtíðina, heldur enn at brúka 40-50 milliónir, sum bert er ein góð íløga 10-15 ár fram í tíðina?

"Hví gera eitt nýtt Gøtueið í Leirvík?" Sera væl vald orð av Alfredi Olsen í Kjakinum í Kringvarpinum, tá evnið varð viðgjørt. Hví gera ein nógv longri veg enn neyðugt, og hvat kostar hann í viðlíkahaldi og kavarudding?

"Ov dýrt," verður nýtt sum undanførsla fyri ikki at gera eina nógv betri og tryggari íløgu í framtíðina við eini lokarennu. Upphæddin, talan er um, er bert brotpartur av tí, sum er nýtt til Gomluræétt, Smyril, tunnil til Gásadals, ferjulegu í Suðuroy o.s.fr. Tað undr-ar meg eisini, at Bjarni Djurholm fær kostnaðin at vera 120 milliónir, tá NCC sigur ein fastan prís á 87 milliónir.

"So fara onnur eisini at krevja tað sama", verður eisini nýtt sum argument ella undanførsla av Bjarna Djurholm. Hetta er burturvið í mínari verð. Havnarfólk ella onnur fara nokk at krevja ein tunnil undir bygd øki fyri tað, um tað ikki verður unt okkum her í Leirvík. Tað er bert ein spurningur um tíð, og hvør fær tann fyrsta tunnilin. Hetta er jú ein góð loysn uppá ávísar samferðslutrupulleikar. Og hví halda áfram við at gera vánaligar loysnir, tá nógv betri loysnir finnast. Skulu vit so ikki bara skunda okkum eitt sindur spakuligari, so tað eisini er forsvarligt peningaliga?

Ávísir tingmenn halda eisini uppá, at ein vegur haruppi er ein íløga til leirvíkingar, tí so fáa vit ein veg, sum vit annars noyðast at gjalda fyri sjálvi. Men hvønn ágóða fáa vit av hesum vegnum, har tað bert er ein íbinding? Landsverk sigur eisini, at framtíðin er, at landsvegir ikki vera samantvinnaðir við bygd økir. Hesum ræður Ráðið fyri Ferðslutrygd eisini frá. Spyrjandi standa vit so í Leirvík og undrast yvir, hví ferðslan fyri einhvønn prís skal leiðast ígjøgnum Leirvíksbygd, samstundis sum talan er um at nýta nógvar milliónir til at leiða ferðsluna úr bygdum økjum aðrastaðni t.d. í Runavík, Skipanesi, Søldarfirði og Gøtugjógv.

### Ferjulegan

Hví skulu vit leirvíkingar siga ja takk til eina verri loysn, enn vit sjálvi hava goldið fyri við ferjuleguni. Ikki færri enn 25. milliónir hava leirvíkingar goldið til ferjuleguna, sum landskassin átti at havt goldið. Ferjulegan varð jú gjørd til norðoyingar. Leirvíkingar hava ikki havt tørv á henni meira enn aðrir føroyingar. Tá Leirvíkar Kommuna valdi at gjalda so nógv fyri hana, var tað m.a. fyri at ferðslan ikki skuldi verða leidd inn í bygdina. Hetta hevur verið ein fyrimunur fyri allar partar. Tað er eingin loyna, at hetta hevur gjørt, at kommunan hevur havt tað ógvuliga tungt fíggjarliga. At vit nú eisini skulu gjalda fyri ein veg, um tað er við pengum ella grundøkjum, er óhoyrt.

### Ein íløga í fortíðina ella framtíðina

Soleiðis málbar ein vinkona seg, tá vit tosaðu um veg har niðri ella har uppi í bygdini. Haldi at flest allir leirvíkingar eru samdir um, at ein lokarenna, er tann besta loysnin fyri bygdina. Tað er tá vit tosa um veg har uppi ella har niðri, at vit eru ósamd. Um hugt verður eftir, hvør heldur hvat, haldi eg, at tað er tað eldra ættarliðið, sum vil hava vegin har uppi, tí annars verður tað ov nógv av tí gamla, sum verður tikið burtur. Um vegurin verður lagdur har uppi, er tað sostatt ein íløga í fortíðina heldur enn framtíðina.

Tað unga ættarliðið vil harafturímóti hava vegaføringina har niðri, tí tey skulu jú búsetast har uppi og noyðast at hugsa um trygd og trivna fyri tey og teirra børn. Hetta kann skjótt gerast ein trupulleiki, um ein landsvegur skal leggjast framvið køksvindeyganum. Vegaføringin har niðri má tí heldur sigast at vera ein íløga í framtíðina.

Sum mamma at trimum smábørnum hevur ferðslutrygdin í bygdini ógvuliga nógv at siga. Um vit fáa eina lokarennu ella tunnil, kunnu vit sum foreldur vera tryggari og framhaldandi lata okkara børn ferðast og spæla innanfyri ávís økir, sum er av so stórum týdningi, tá vit hava valt at búsetast í einari bygd. Tá avgerðin eisini varð tikin, at vit skuldu búsetast í Leirvík, var ein av grundunum, at Leirvík var ein friðarlig bygd hjá børnum at vaksa upp í, samstundis sum hon liggur væl fyri. At Leirvík eisini er ein sera vøkur bygd, eri eg errin av at kunna siga.

Norðoyingar skulu vera vælkomnir til Leirvíkar, og eg gleðist saman við tykkum nú nýggir møguleikar opnað seg fyri tykkum við Norðoyatunlinum. Bæði at bjóða tykkum vælkomnum til Leirvíkar og at varðveita hesi tingini, sum hava so nógv at týða fyri meg og flestu Leirvíkingar, nýtist ikki at vera ein trupulleiki, um bert vit fáa lokarennuna ella ein tunnil, soleiðis at ferðslan kann vera leidd ígjøgnum bygdina uttan ov nógvan ampa fyri bygdina og bygdarfólkið.

Er vegur í Leirvík nøkur tænasta, sum landið veitir Leirvíkar kommunu, so er tað ein bjarnartænasta.

Eg vil tí heita á Løgtingið um at fremja ta bestu loysnina og gera eina lokarennu undir Leirvíksbygd, soleiðis sum bygdarráðið einmælt hevur samtykt við stórari undirtøku frá bygdarfólkinum.

# Kom nú Jóannes Eidesgaard, sig sum er!

ÁKI ANDREASEN



Eftir at Javnaðarflokkurin kom aftur í samgongu eftir 6 ár í andstøðu, er framvegis torført at fáa eyga á politikkin, sum annars var so sjálvsagdur í andstøðu.

Eftir lemjandi atfinningar mótvegis rikna politikkinum hjá samgonguni ikki bara nú altjóða arbeiðaradagin, men frá fyrsta degi samgongan varð skipað, kom Føroya løgmaður, Jóannes Eidesgaard við grundgevingini, sum so mong hava bíðað eftir. Grundgevingar fyri:

- *hví samgongan tekur um tey vælbjargaðu?*
- *hví skerjingar rakar tey veiku, mentan og gransking?*
- *hví samgongan hevur eftirlíkað øllum krøvum frá donsku stjórnini?*
- *hví skúlar verða fluttir?*
- *hví løgmaður tekur Føroya løgting av ræði og sum gísla?*
- *hví Javnaðarflokkurin vrakar uppskot, sum gagna samhaldsfestinum?*

Og soleiðis kundi listin gjørst enn longri. Gundgevingin stendur at lesa í Sosialinum 3 mai, og er:

».... at Javnaðarflokkurin sum samgonguflokkur fyrst og fremst hevði lagt seg eftir at fáa eitt gott samgongustev og harvið skapa arbeiðsfrið. Hetta var nú eydnast, segði hann. Eitt annað, sum Javnaðarflokkurin eisini vildi hava upp á pláss beinanvegin, teir komu í samgongu, var at fáa viðurskiftini millum Danmark og Føroyar í rættlag...«.

Eg hevði ynskt, at samgongan og løgmaður høvdu okkurt annað at borðreiða við, tá ið hvøssu atfinningarnar skuldi afturvísast. Tað er vorðið eitt sindur troyttandi, at undanfarna samgonga – og Tjóðveldisflokkurin skal fáa »heiðurin« fyri líkt og ólíkt og nú eisini fyri, at Javnaðarflokkurin hevur blakað øll aðalmál á sjógv og rekur fyri vág og vind á politiska vígvøllinum.

### So vita vit tað

Fyri tey, sum ikki vistu tað frammanundan, má tað eftirhondini vera ein staðfestur veruleiki, at borgarligur sambandspolitikkur er vørumerki hjá hesi samgonguni.

Samgongan hevur ein løgmann, sum so fegin vil ferðast millum aðrar statsleiðarar, men veruleikin er, at alt, sum hann fyritekur sær, skal umvegis danskar ráðharrastovur til góðkenningar, ímeðan samfelagið heima í Føroyum verður vanstýrt – úr enda í annan; afturat sær hevur løgmaður nakrar landsstýrismenn, sum ikki taka eina einastu avgerð um nakað sum helst – fyri tað kundi gamla skipanin verið galdandi fyri allar landsstýrismenninar.

So vit eru nøkur, sum høvdu ynskt, at løgmaður segði, sum var: at hann og Javnaðarflokkurin sita í samgongu – kosta tað, tað kosta vil.

### Eingin visjón – eingi úrslit

Sum neyðbremsa er so Visjón 2015 komin á vøllin – ein rúgva av arbeiðsbólkum, nógv góð fólk og glæsiligar framløgur og orð. Men skulu vit náa heimsins besta samfelag í 2015 við førda politikkinum? Skal ein samgonga - sum hevur gjørt avtalur við donsku stjórnina, sum staðfestir danskt yvirvald - rokna við at sleppa upp í part í altjóða samfelagnum sum ein danskur handlangari?

Eg trúgvi neyvan, at tey flestu hava eina hóming av, hvat endamálið er við fínu heimasíðuni og øllum arbeiðsbólkunum í 2015 ætlanini – og satt at siga so trúgvi eg heldur ikki, at samgonguflokkarnir hava nakra visjón sjálvir, tað prógvar samgonguskeiðið higartil: eingin úrslit sum gagna samfelagnum – bert teimum fáu.